# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



*6. februar bleiv Karen endiliga stórasystir. Hon fekk ein beiggja sum vigaði 4020 gram og var 53 cm langur. Foreldrini eru Martha Haahr og Elias Naur, búsitandi í Odense*



*26. februar fingu Bjarta Haraldsen og Ingi Lamhauge, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 3900 gr.*

16. februar fingu Wilhelmina Poulsen og Fróði Olsen, Vágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 4030 gr.

20. februar fingu Sigrid og Rógvi Kærbech, Vágur, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3820 gr.

22. februar fingu Krista og Olaf Davidsen, Æðuvík, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4275 gr.

22. februar fingu Nicole L. Nielsen og Johnny Guðjónsson, Esbjerg, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3530 gr.

23. februar fingu Marin Johannessen og Hugin Helgason, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3300 gr.

23. februar fingu Stina og Dan Joensen, Sønderborg, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4000 gr.

24. februar fingu Maibritt Luid Johannesen og Gunnar Karbech Mouritsen, Keypmannahavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4300 gr.

24. februar fingu Gunvá Hovgaard og Heðin Magnussen, Argir, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3600 gr.

26. februar fingu Beinta Skaalum og Leif Lamhauge, Argir, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3400 gr.

28. februar fingu Durita Restorff og Hans Cartni Rasmussen, Hoyvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3500 gr.

# Minningarorð um Kirsten Dalfoss



Tann 8. januar andaðist Kirsten Dalfoss, bert 59 ára gomul. Ikki vardi tað meg, at tú átti so stutta tíð eftir, tá Signar eitt kvøldi ringdi og segði, at tú vart farin á Landssjúkrahúsið. Tit høvdu, sum so ofta, verið ein túr, men tú vann ikki upp hús aftur. Eg var og vitjaði teg á Landssjúkrahúsinum, tá fekk eg ikki samband við teg, og tað var sera hart at síggja teg liggja so hjálparleysa, góða Kirsten. Soleiðis gingu fýra dagar, har vit vónaðu, men so orkaði tú ikki meira.

Tað eru nógvir tankar, ið hópa seg upp, nú tú mín góða vinkona ikki er her longur. Enn í dag, nú næstan tveir mánaðir eru farnir, kennist tað sera tungt at hugsa um teg, og at tú ikki ert millum okkum.

Eg kom at kenna tykkum fyrst í 80'unum, tá vit bygdu á Ternuryggi. Vit gjørdust rættiliga góðir vinir, komu nógv saman, og mangan hevur tú bjoðað okkum ein góðan bita.

Tann 27. februar høvdu tú og Signar verið gift í 36 ár. Brúdleypsdagin hjá tykkum gekst tú høgt uppí, og altíð gjørdi tú nógv burturúr og bjoðaði okkum við. Tú vart óføur í køkinum og gjørdi eisini smyrjibreyð út av húsinum, sum mong munnu hava notið gott av. Eisini hevur tú arbeitt í Sparikassanum og Sjóvinnubankanum, har tú gjørdi mat til starvsfólkini. Eitt skifti hevði tú børn í dagrøkt, so at tú samstundis kundi vera heima hjá tínum børnum, sum tá gingu í skúla og altíð høvdu sína elskaðu mammu at koma heim til.

Góða Kirsten, vit vistu, at tú føldi teg ikki altíð so fríska, men tað var ikki nakað, vit løgdu til merkis í gerandisdegnum.

Títt pláss stendur nú tómt, og saknurin er ómetaliga stórur, serliga hjá Signari, sum livdi so tætt at tær og var tær ein fyrimyndarliga góður maður, og hjá børnunum báðum, tað verður ikki tað sama at koma heim í feriu sum fyrr, men pápan eiga tey góðan. Okkara stóru samkenslu eiga tit.

Men Gud er góður og hjálpi hann tykkum í sváru sorg tykkara.

*Eitt eri eg glað og takksom fyri, at eg kundi vera við at bera teg til tín seinasta hvíldarstað.*
*Hvíl í friði mín góða vinkona og granni.*
*Eg fari altíð at minnast teg við takksemi.*
*Friður veri við minninum um Kirsten Dalfoss.*

**Finngerð**

Astrid Mouritsen, listakvinna:

# Framsýning við uppboðssølu í Jinx

**Hósdagin 1. mars læt ein málningaframsýning hjá listakvinnuni Astrid Mouritsen upp í Gallarí Jinx á Áarvegnum í Havn. Tann eini av málningunum verður seldur á uppboðssølu til frama fyri »Bót til Bata«**

FRAMSÝNING



*Astrid Mouritsen*

Astrid Mouritsen, listakvinna, hevur í hesum døgum eina málningaframsýning í Gallarí Jinx í Havn. Astrid er fødd í Klaksvík í 1981 og hevur frá ungum árum havt áhuga fyri at skapa, tekna og mála, og hevur støðugt ment seg.

Hon hevur gingið í kvøldskúla í máling hjá Archibald Blak í Klaksvík og Pól Skarðenni vestri í Vágunum. Í 2001 fór hon á Háskúla í Kerteminde, Fyn. Høvuðsgreinirnar í skúlanum vóru list, handverk og design. Astrid arbeiðir sum miðlagrafikari, og málar í frítíðini.

Astrid Mouritsen hevur verið við til ymiskar framsýningar, so sum Norðoyastevnuframsýning, Lions Club, stuðulsframsýning hjá Samverkamonnum o.a. Hon hevur júst sýnt fram í Snarskivuni í Tórshavn.

Málningarnir hjá henni eru eisini javnan at síggja í Glarsmiðjuni.

**Uppboðssøla**

Eitt serstakt í hesi framsýning er, at tann eini av málningunum verður seldur á uppboðssølu. Peningurin, sum kemur inn fyri hendan málningin, fer óskerdur til "Bót til Bata", sum er ein sjálvhjálparbólkur hjá Føroya Felag Móti Krabbameini. Um tú hevur áhuga í at stuðla "Bót til Bata", kanst tú venda tær til starvsfólkið á Jinx og geva títt boð upp á málningin. Tá ið framsýningin endar, fær tann ið hevur givið hægsta boðið, málningin. Framsýningin er frá 1. til 15. mars.



*Hesin málningurin verður seldur til frama fyri »Bót til Bata«*